# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Dánjal Hentze av Sandi** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Zion á Sandi mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnas Dánjal kunnu lata eina gávu til Kristastovu. Konta í peningastovnunum.

**Olianna S. Michelsen, Tvøroyri** fødd Haraldsen, ættað úr Sandavági andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi leygardagin 13. september, 84 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týskvøldið kl. 18:00 í Tvøroyar kirkju. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13:00. Tey, ið vilja minnast Oliannu kunnu lata Missiónshúsinum á Tvøroyri eina gávu.

**John (Jonn) Símun Jensen, ættaður av Sandi**, andaðist í heiminum í Keypmannahavn, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður verður lýst seinni.

**Kristin Bærendsen, Argir**, sonur Sigurd og Sólvu Bærendsen í Skopun andaðist sunnudagin, 27 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Tøkk

Hjartalig takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Johan Jensen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til Sverra Steinhólm og Berg Debes Jensen, fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til leguhúsið í Nesvík.
Stóra tøkk til tykkum mongu, sum hjálptu til í ervinum.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Tórgerð**

## Tøkk

Hjartalig vilja vit takka øllum, sum á allan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, abbi og verfaðir

**Jóannes (Jóa) Mikkelsen**
Syðrugøta

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina.
Takk fyri heilsanir, kransar, blómutyssir og gávur til Gøtu kirkju og tykkum mongu, sum komu at fylgja honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Konan Gudny (Gudda) v. familju**

# Dinnafía farin



*Jógvan Sofus og Dinnafía*

Tað var við sorgblídni, at eg frætti í farnu viku, at Dinnafía Ferjá stillisliga var sovnað, 91 ára gomul. Ikki gjørdist langt teirra millum. Jógvan Sofus fór seinasta heyst, 94 ára gamal. Hetta var beint áðrenn, tey annars høvdu kunnað hildið 70 ára brúdleypsdag.

Tey høvdu eitt langt og ríkt lív saman. Tey funnu saman í so ungum aldri, at tey hildu saman í heili 75 ár. Hetta er bert fáum beskorið, men hetta sigur eisini nakað um trúfesti móti hvørjum øðrum.

Fyri meg sjálvan kom Dinnafía saman við Jógvan Sofus at hava ein serligan týdning. Eg havi gjøgnum nógv ár roynt at fáa niðurskrivað mest møguligt av søgu og lagnusøgu fiskimanna. Tað eru nógv skrivað um fiskimenn sjálvar, men ikki so nógv um teirra familjur heima. Tað er eisini nógv skrivað um allar tær vanlukkur, sum fiskimonnum hevur verið fyri, men tað er sera lítið skrivað um, hvussu tey heima upplivdu hetta.

Eri sjálvur komin heilt fitt til Gjáar. Tá var skjótt at koma at kenna Jógvan Sofus, sum prátaði við tey, sum komu hagar. Kom so eisini inn til teirra, og skjótt var at koma eftir, at Dinnafía var ein sera vitandi kvinna. Hon mintist so ótrúliga væl, og hon dugdi eisini væl at greiða frá.

Her skal verða nevnt eitt dømi um hennara minni. Í fjør greiddi hon frá, at hon í 1933 hevði verið inni í mínum barndómsheimi í Norðragøtu í samband við konfirmatión hjá beiggja sínum. Hon mintist framvegis eina mynd av ommu míni, ið var deyð í 1917, og sum hekk á vegginum. Har hongur hon enn.

Tá so Miðvikan byrjaði í Sosialinum varð byrjað við teimum frásøgnum hjá Andreas í Tarti, sum lógu eftir, tá ið FF-blaðið varð niðurlagt. Hetta var ein framúr lívssøga hjá einum fiskimanni.

Tað, sum síðan lá í kortunum, var at fáa søguna hjá Dinnufíu. Tá ið fólk koma í hennara aldur, ræður eisini um ikki at liggja sjóvarfallið av sær. Tá kann tað skjótt gerast ov seint.

Her lá væl fyri. Farið var nakrar ferðir til Streymnesar at práta við tey bæði, og úrslitið gjørdist sjey partar av Miðvikuni. Hetta var so mikið nógv, at tað hevði fylt eina hálva bók.

Dinnafía var dóttir ein fiskimann og giftist við einum fiskimanni, so hon kendi korini hjá teimum, sum sótu heima sum fáur annar. Teimum greiddi hon eisini væl og virðiliga frá.

### Søgan um Acorn

Tað, sum serliga kemur at standa eftir í hesi frásøgn, er hennara frágreiðing um, hvussu tey við Gjógv upplivdu vanlukkuna við Acorn í 1928, júst fyri 80 árum síðani. Søgan um vanlukkuna er sum so kend. Men heima við Gjógv varð ongantíð tosað um hana, so ræðulig, sum hon var.

Søgan var í stuttum, at eldur kom í lugarið á Acorn av einum karbidunki. Sjey mans brendust til deyðis, av hesum vóru fýra frá Gjógv. Ein fimti gjáarmaður brendist nærum til avlívs, tá ið hann til fánýtis royndi at bjarga sínum 17 ára gamla soni. Pápin gjørdist gamal, men var sera nógv merktur av vanlukkuni.

Dinnafía var í skúla hendan morgunin. Tá kemur Sofus Debes, sum hevði telefonstøðina, inn í skúlan og vil tosa við læraran. Børnini verða síðan send til hús. Tey skilja, at her er okkurt galið. Fía, sum búði á telefonstøðini, hevði sitið og grátið í skúlanum. Hon visti longu beskeð, sum rímiligt er.

Síðan frættist, at Sofus Debes var farin inn í Ólastovu við bláari húgvu, sum bert vóru nýttar til jarðarferðir. Hetta kundi bert boða frá ófrættum. Tað varð skjótt, at greitt varð, hvat ið var hent.

Øll henda frásøgnin var so kensluborin, at tað mundi standa á mongum, sum lósu hana. Hon gav eisini eitt innlit í føroyska fólkasálina, sum neyvan er lýst so væl fyrr.

Tað vísti seg eisini, at tey sum varaðu av hesi hending, vóru sera fegin um, at søgan nú var skrivað, og sum hava takkað fyri tað. Hetta hevði verið eitt tabu, sum eingin tosaði um. Tí høvdu fólk ligið innibrend við sínum kenslum, har tað í dag verður ásannað, at tosast skal opið um slíkt.

Tað kann sigast at hava verið í tøkum tíma, at henda frásøgnin varð varðveitt fyri okkara eftirkomarar, so teir kunnu fáa eitt sindur av innliti í lívsumstøðurnar hjá teimum, sum undan eru farin.

### Giftist tá ið húsini vóru goldin

Dinnafía fór sum 17 ára gomul til Vágs at vaska fisk. Hesum greiddi hon eisini væl frá. Ikki var tað minst áhugavert, tá ið hon saman við øðrum gentum fór til gongu til Hvalbiar í grind og endaði á jóansøku á Tvøroyri. Men tíðin í Vági gjørdist styttri enn ætlað. Tað frættist við Gjógv, at meslingar gingu í Vági. Hetta ræddist fólk sum tann versta, og Dinnafía fekk boð um at koma heim beinanvegin.

Nú fer at vera tíð til at giftast. Men hetta mátti vera við skili. Fyrst skuldu húsini byggjast og gjaldast. Men pengar máttu eisini vera í kassanum, áðrenn tey vildu setast í búgv. Eitt ár afturat til skips hjá Jógvani, og tá høvdu tey so mikið av peningini, at tað var ráðiligt at giftast!

Tey bæði fingu børnini Jónhild, Gerdu, Katrin, Kristinu og Sjúrð. Tey eiga so aftur børn og barnabørn.

Tað var ótrúliga stuttligt at koma at kenna Dinnufíu og Jógvan Sofus. Tey verða ikki gloymd.

**ó.**